**Bárður S. Nielsen**
**Edmund Joensen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Helgi Abrahamsen**
**vegna Sambandsflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 75/2018: Uppskot til samtyktar um sundurskiljing av netinum hjá SEV soleiðis, at netparturin verður ein sjálvstøðug eind**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvussu netið hjá SEV kann verða skilt frá hinum virkisøkinum soleiðis, at fult gjøgnumskygni verður í kostnaðinum av netpartinum.

**Viðmerkingar**

Endamálið við uppskotinum er at tryggja javnbjóðis kapping av framleiðslu og sølu av elveiting í Føroyum.

Visjón 2030
Fyri at náa málinum um einar grønar Føroyar í 2030 skulu rættuliga stórar íløgur gerast í elorku-økið, bæði á framleiðslusíðuni og í netpartinum. Skal hetta málið náast, er neyðugt at øll segl verða sett til, bæði vinnuligt og politiskt.

Tað eru fleiri veitarar, ið siga seg verða til reiðar við nýggjum loysnum, bæði í framleiðslu og sølupartinum. Fortreytin fyri hesum er, at tað er fult gjøgnumskygni á økinum, soleiðis at allir veitarar hava somu atgongd til netið fyri sama prís.

Ein av hornasteinunum í framburði er kapping, og kann í hesum sambandi vísast á, hvussu stórur framburðurin hevur verið á teimum økjum, har virksemið er lagt um og fortreytirnar fyri kapping eru skaptar.

Síðan vit hava skapt neyðugt gjøgnumskygni og fortreytir fyri kapping á tryggingar- og teleøkinum, eru prísir og tænasta betrað munandi.

Marknaðargerðin hevur skapt nýggjar møguleikar og tænastur, og hevur verið til stórt gagn fyri allar føroyingar og betrað kappingarførið hjá føroyskari vinnu.

**Kommenterede [HD1]:** SEV hevur áður latið viðmerkingar inn til Løgtingsmál nr. 89/2017

**Kommenterede [HD2]:** SEV hevur fingið gjørt frágreiðing nevnd: "Funktionel adskillelse af elsystemet på Færøerne", hendan verður almannakunngjørd 4. februar 2019.

**Kommenterede [HD3]:** Sambært verandi elveitingarlóg er fult gjøgnumskygni í kostnaðinum hjá netpartinum, hetta síðani 1. januar 2009.

**Kommenterede [HD4]:** Ein sundurskiljing av netinum í sjálvum sær tryggjar ikki javnbjóðis kapping, hvørki innan framleiðslu ella sølu. Heldur má man meira ítøkiliga taka støðu til, hvussu man frameftir skipar tey bæði virkisøkini.

**Kommenterede [HD5]:** Fleiri veitarar hava sagt nógv, tó uttan at siga nakað ítøkiligt um, hvussu virkisøkini skulu skipast og hvar forðingarnar eru í skipanini undir verandi elveitingarlóg.

**Kommenterede [HD6]:** Sum sagt omanfyri, so er hendan fyritreytin til staðar í verandi skipan.

**Kommenterede [HD7]:** SEV tekur undir við kapping og virkar eisini í og fyri kapping í øllum virksemi sínum, har hetta gevur meining. SEV tekur undir við, at útbyggingar við vindorku, sólorku og sjóvarfalsorku verða boðin út. Eisini er meginreglan í SEV, at allar útbyggingar felagsins verða kappingarútsettar.

Á sama hátt vil ein marknaðargerð av el-marknaðinum verða við til at skapa nógv fleiri møguleikar fyri orkuloysnum, og geva bæði privatum húsarhaldum og vinnuni nógv fleiri tilboð um bíligari orku, samstundis sum útboðið av orkuloysnum fer at økjast munandi.

Orkuráðstevnan 2017

Tað kom týðiliga fram á orkuráðstevnuni, sum Sambandsflokkurin skipaði fyri á vári 2017, at um grøna málið skal náast, er neyðugt við eini liberalisering av elmarknaðinum í Føroyum. Skulu skapandi kreftirnar sleppa fram at og veruliga sleppa at útfolda seg, er neyðugt at opna dyrnar og loyva privatum aktørum inn á marknaðin. Verandi skipan er alt ov stirvin.

Ein marknaðargerð av orkuøkinum vil veruliga seta ferð á menningina, og vil hetta samstundis skapa nógv nýggj størv innan orkuøkið.

Spurningurin um liberalisering av el-orkuøkinum er í veruleikanum ein spurningur um, hvat samfelag vit ynskja at hava. Skulu vit hava frælsi og fríar vinnukarmar, har fyritøkurnar á orkuøkinum eru við til at skapa menning og vøkstur og flyta okkum móti einum grønari samfelag, ella skulu vit hava eitt samfelag við einkarætti (monopoli) á orkuøkinum, har lítil og eingin framgongd er móti grønu kósini.

Hví liberalisera?

Ein liberalisering av elmarknaðinum í Føroyum er í sjálvum sær ikki eitt endamál, men endamálið er at skapa eina produktiva og effektiva elframleiðslu, sum hevur við sær, at privati brúkarin, tað almenna og vinnan fáa ein bíligari og kappingarføran elprís.

Harafturat vil ein liberalisering hava við sær, at framleiðsla og móttøkuskipanir fyri elorku kunnu útbyggjast munandi skjótari og sostatt fylgja tí grønu kós, sum tær almennu Føroyar hava sett sær fyri.

Framtíðar fyriskipan av elorkuøkinum

Vanliga verður elmarknaðurin skildur sundur í 3 partar:

1. Framleiðsla
2. Net
3. Søla

Ein týðandi partur er at tryggja gjøgnumskygni av marknaðinum av elveitingini, har framleiðslan og sølan kunnu vera eitt bland millum alment og privat, meðan netparturin verður hildin á almennum hondum og skal virka meira óheft enn í dag.

Við einari marknaðargrundaðari skipan sleppa privatir aktørar at virka á framleiðslumarknaðinum, og vísa royndirnar úr øðrum londum, at hetta vil hava við sær rationellari, effektivari og bíligari elframleiðslu, til fyrimuns fyri húsarhaldini og vinnuna. Samstundis skapar tað møguleikar í søluliðnum, at nýggj tilboð og produkt koma á marknaðin, sum eisini er til fyrimuns fyri samfelagið, húsarhaldini og vinnuna.

**Kommenterede [HD8]:** SEV tekur undir við hesum sjónarmiðnum, og gongur tað longu sjón fyri søgn. Tí við nýggju elveitingarlógini frá 2007 hendi hendan marknaðargerðin á elorkuøkinum hvat framleiðsluni viðvíkur og hevur hetta givið við sær útbyggingar, sum hava spart føroysku brúkarunum fyri dýrar oljurokningar til elframleiðsluna og eigur at verða hildið á fram á hesi kósini. Eisini eru ásettar standardtreytir fyri smærri framleiðsluverk (undir 11 kW) og eger tað longu nú frítt hjá einum og hvørjum at binda slíka framleiðsluskipan í elnetið. Avtala er somuleiðis gjørd við privat felag um avlopsorku frá biogassverki á Sandsvíkahjalla.

**Kommenterede [HD9]:** Á nevndu ráðstevnu førdu nøkur hetta sjónarmið fram, hin vegin vóru tað eisini fleiri luttakarar á ráðstevnuni, sum førdu fram, at verandi skipan, sum inniheldur libralisering, ikki er ein forðing fyri at náa grøna málinum.

**Kommenterede [HD10]:** Nógvar og góðar skapandi kreftir arbeiða í dag bæði hjá SEV og hjá myndugleikanum. Privatir aktørar eru longu nú vælkomnir, teir hava møguleika fyri at senda inn uppskot teirra til myndugleikan, sum sambært elveitingarlógini kunnu koyra uppskotini í útboð.

**Kommenterede [HD11]:** Á framleiðsluøkinum er full ferð á menningini og virkað verður longu nú á vinnuligum fyritreytum sambært galdandi elveitingarlóg. Hin vegin, so manglar tað at enn koma ferð á brúkaraskiftini frá olju til el. Um ein libralisering skal hendan innan sølu av el og hvat ...

**Kommenterede [HD12]:** Sum sagt omanfyri, so er elframleiðslan libraliserað við verandi elveitingarlóg. Tað kann vera, at ein libralisering av søluni av el fremur eina manglandi menning. Vert er at kanna nærri hvussu hetta kann gerast og hvat íkastið til samlaðu skipanina verður.

**Kommenterede [HD13]:** Sum áður sagt, so er elframleiðslan libraliserað. At útbyggja elframleiðsluna munandi skjótari, enn almennu Føroyar longu hevur sett sær fyri (2030) er óðamannaverk, tí hetta vil leggja eitt eyka trýst á at skula hækka elprísin.

**Kommenterede [HD14]:** Gjøgnumskygni er tryggja í verandi elveitingarlóg. Og elframleiðslan fer í dag fram í einari blanding millum alment og privat. Hvørt sølan av el skal fram av privatum er sum sagt oamnfyri ein áhugaverdur spurningur.

**Kommenterede [HD15]:** Hesum tekur SEV fult undir við. Týðandi er, at netið og veitingartrygdin – undir einum nevnt kjarnuveitingin - hanga saman, og hetta verður gjørt við at lata netið, oljuverkini, vatnorkuverkini og komandi pumpuverk liggja samlað í einari eind.

**Kommenterede [HD16]:** Privatir virka longu sum er innan elframleiðsluna: Sp/f Vindrøkt og P/F Føroysk Náttúruorka eru tvey dømir um hetta, eins og vindfeløgini hjá SEV í Neshaga og í Húsahaga virka á vinnuligum grundarlagi.

**Kommenterede [HD17]:** Tað kann vera, at ein libralisering av søluni av el fremur eina manglandi menning. Vert er at kanna nærri hvussu hetta kann gerast og hvat íkastið til samlaðu skipanina verður.

Tað er umráðandi, at tilgongdin verður gjørd við øllum viðkomandi áhugabólkum sum viðspælarum. Tí eiga t.d. kommunurnar, sum í dag eiga, reka og stýra meginpartinum av allari elorkuframleiðslu í Føroyum, eisini at fáa ein týðandi leiklut í eini komandi nýggjari elorkuskipan fyri Føroyar. Harafturat mugu nógv fleiri vinnurekandi aktørarar sleppa framat at framleiða elorku til føroyska marknaðin, eitt nú fyri at náa høga málinum um einar grønar Føroyar í 2030.

Kommenterede [HD18]: Vinnuligu aktørarnir sleppa sum er framat í tann mun teir eru kappingarførir

Viðmerkjast skal, at í eini komandi nýskipan av elorkuøkinum eigur alla tíðina at vera fokus á, hvat tænir brúkaranum best og verður bíligast í framtíðini, tá talan er um elorkuveiting. Eisini eigur fokus at vera á umstillingina frá olju- til vindorku - grøna kósin.

Altjóða gongdin

ES-londini hava samtykt, at eitthvørt orkukervi, sum fer upp um ávíst mark (500 GWh), skal liberaliserast og marknaðir minni enn 500 GWh eru eisini egnaðir til liberalisering, men tá er tað á sjálvbodnum grundarlag.

Kommenterede [HD19]: ES ásetir, at isoleraðar orkuskipanir, sum vóru undir 500 GWt í 1996, kunnu fáa undantak fyri millum annað at gera sundurskiljing millum net og framleiðslu.

Føroyar liggja í løtuni á umleið 350 GWh og við stóru útbyggingunum á ravmagnsøkinum komandi árini, fara vit upp um 500 GWh-markið um fá ár.

Tí er tað eyðsýnt, at tá ES kann krevja eina liberalisering við 500 GWh, letur tað seg sjálvsagt væl gera at liberalisera føroyska elmarknaðin longu nú - marknaðurin er ríkiliga stórur.

Kommenterede [HD20]: Hetta kann ES ikki eftir verandi skipan og hevur ES millum annað givið undantak til Cypern, Malta, Azorerne og Madeira. Í sambandi við at Malta hevur fingið og Cypern fær sjókaðal inn á meginøkini, fara undantøk teirra úr gildi.

Einasti spurningurin er tískil, hvussu ein liberalisering skal fara fram. Tað eru fleiri boð upp á loysnir um tilgongdir at liberalisera. Tí verður her í uppskotinum lagt upp til, at landsstýrið kann kanna og leggja fram frágreiðing um, hvør tilgongd er best hóskilig til, hvussu netið hjá SEV kann verða skilt frá hinum virkisøkinum soleiðis, at fult gjøgnumskygni verður í kostnaðinum av netpartinum.

Kommenterede [HD21]: Tað er ikki gjøgnumskygni sum manglar. Hinvegin er ein libralisering av sølu av el ein spurningur, sum er verdur at kanna og forhalda seg til.

Á Løgtingi, 2. november 2018

Bárður S. Nielsen Edmund Joensen

Kaj Leo Holm Johannesen Helgi Abrahamsen